tylgiskjal 2

LM-087/2025

MÁLRÁÐIÐ
øll eiga málið

Løgtingið
johnhardk@logting.fo

23. februar 2023

Til Bjørt Samuelsen, løgtingsformann

Løgtingsformaðurin vendi sær til Málráðið í skrivi dagf. 1. februar 2023 og spurdi um hesi starvsheiti Løgtingsins:

Løgtingsmaður

Á nútíðarføroyskum sipar orðið *maður* vanliga til *mannfólk* heldur enn *menniskja*. Tí er skilligt og rímiligt, at almenna heitið *løgtingsmaður* verður broytt. Málráðið mælir til, at heitið *løgtingsfólk* verður nýtt, tá lívkynið er óvist ella óviðkomandi, men at heitini *løgtingsmaður* og *løgtingskvinna* í øllum øðrum førum verða javnsett við heitið *løgtingsfólk*. Hesi trý orðini eru greið og málsliga góð, umframt at tey longu er algongd í talu og á skrift.

Landsstýrismaður

Málráðið mælir til, at heitið *landsstýrisfólk* verður nýtt, tá lívkynið er óvist ella óviðkomandi, og at heitini *landsstýrismaður* og *landsstýriskvinna* í øllum øðrum førum verða javnsett við heitið *landsstýrisfólk*.

Løgtingsformaður

Heitið *løgtingsforseti* hevði verið málsliga í lagi, tí *forseti* kann merkja *formaður*, men á føroyskum svarar *forseti* vanliga til 'president'. Tað er greiðari, um orðini *forfólk* og/ella *formaður/forkvinna* verða nýtt, av tí at tey eru kend frammanundan. Málráðið mælir tískil til, at heitið *løgtingsforfólk* verður nýtt, tá lívkynið er óvist ella óviðkomandi, og at heitini *løgtingsformaður* og *løgtingsforkvinna* í øllum øðrum førum verða javnsett við heitið *løgtingsforfólk*.

Løgmaður

Heitið *løgmaður* hevur longri søgu enn hini heitini við liðinum *-maður*, og tískil kann støða takast til hetta heitið lutfalsliga óheft at hinum. Tað er tó vert at hava í huga, at atfinningarnar ímótur hinum heitunum í grundini hava sama gildi í sambandi við heitið *løgmaður*. Hesar atfinningar eru, at *maður* ikki merkir *menniskja* á nútíðarføroyskum, og at tað er mismunur, at heiti við *-maður* verða nýtt at sipa til mannfólk og konufólk, tá heiti við *-kvinna* ikki kunnu sipa til mannfólk. Verður heitið *løgmaður* varðveitt, er talan um eitt undantak frá meginregluni um kynsneutralitet, og grundgevingin fyri undantakinum er tá, at *løgmaður* er eitt heiti við søguligari hevd, ið sipar til embætið sjálvt. Hetta undantakið má harafturat gerast við tí í huga, at øll hesi heitini hava eina ávísa hevd við *-maður* uttan mun til kyn. Málráðið mælir samanumtikið til, at heitið *løgmaður* verður nýtt, men vísir á, at heitini *løgkvinna* og *løgfólk* eru málsligir møguleikar, og at hetta starvsheitið kann endurskoðast eftir tørvi í framtíðini.

Formansskapurin í Løgtinginum

Heitið er ikki rættiliga kynsneutralt, men orð, sum ikki enda við *-maður*, hóast tey innihalda *maður*, eru ikki altíð kynjað í sama mun sum orð, ið enda við *-maður*. Sbr. *manntómur*, *mannaføði*, *mansbarn* o.s.fr. Málráðið metir tí, at *formansskapur* er í lagi, men vísir harafturat á, at *forfólkaskapur* og *forkvinnuskapur* eru málsligir møguleikar.

Floksformaður

Málráðið mælir til, at *floksforfólk* verður nýtt, tá lívkynið er óvist ella óviðkomandi, og at heitini *floksformaður* og *floksforkvinna* í øllum øðrum førum verða javnsett við *floksforfólk*.

Aldursformaður

Málráðið mælir til, at *aldursforfólk* verður nýtt, tá lívkynið er óvist ella óviðkomandi, og at heitini *aldursformaður* og *aldursforkvinna* í øllum øðrum førum verða javnsett við *aldursforfólk*.

Nevndarformaður

Málráðið mælir til, at *nevndarforfólk* verður nýtt, tá lívkynið er óvist ella óviðkomandi, og at heitini *nevndarformaður* og *nevndarforkvinna* í øllum øðrum førum verða javnsett við *aldursforfólk*.

Varamaður

Málráðið mælir til, at *varafólk* verður nýtt, tá lívkynið er óvist ella óviðkomandi, og at heitini *varamaður* og *varakvinna* í øllum øðrum førum verða javnsett við *varafólk*.

Varalimur

Málráðið mælir til, at *varalimur* framhaldandi verður nýtt.

Embætismaður

Málráðið mælir til, at *embætisfólk* verður nýtt, tá lívkynið er óvist ella óviðkomandi, og at heitini *embætismaður* og *embætiskvinna* í øllum øðrum førum verða javnsett við *embætisfólk*.

Uttantingsmaður

Málráðið mælir til, at *uttantingsfólk* verður nýtt, tá lívkynið er óvist ella óviðkomandi, og at heitini *uttantingsmaður* og *uttantingskvinna* í øllum øðrum førum verða javnsett við *uttantingsfólk*.